# Hans gevst í All That Rain

**Hans Ravnsfjall gevst, sum gittarleikari í All That Rain, seinastu framførslurnar við honum verða 20. mai í KÍ-Høllini og 21. mai í TB-Húsinum**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*

Henning Nicodemussen trummuleikari í bólkinum, sigur: At teir sjálvandi eru keddir av at missa gittarleikaran. Teir eru allir enn væl. Hvørki tónlistarliga ella persónliga eru nakrar ósemjir.

Hans Ravnsfjall byrjaði í bólkinum, tá Jens Marni Hansen fór burturúr í 2001. Hann var eitt skiftið sangari og gittarleikari. Men síðan fyrst Pól Arni Holm og síðan Rókur Jakobsen hava røkt sangara leiklutin, hevur Hans fyrst verið gittarleikari.

Hans, sigur við portalin, at tað er við sorgblídni, at hann traðkar aftur. Men hetta er neyðugt av persónligum og familjuligum ávum. Hann leggur tó dent á, at hann ikki gevst, sum tónleikari, men bara fyribils skiftur gear niður.

Enn er eingin avloysari funnin. Bólkurin fer í næstum at tosa um, hvat víðari gerast skal. Men fleiri uppløgd boð eru. Her er fyrst og fremst Rói Christiansen, kendur úr Deja Vu og Tangz, sum avloysti í ATR herfyri.

Men eitt boð, sum heldur ikki er heilt burturvið, er, at bólkurin aftur gerst ein trio. Rókur Jakobsen er farin at spæla meira gittar í bólkinum, og spurningurin er, um hann ikki kann røkja allan gittarleiklutin. Henning sigur, at hann avvísur hvørgan møguleika, men at einki er avjørt enn. Tó er eitt víst, hetta als ikki er endin á All That Rain.

# Kaupthing fíggjar nú Fiskavirking

**Teir báðir stóru føroysku peningastovnarnir, Føroya Banki og Føroya Sparikassi, hava fingið ein harðan kappingarneyta í Kaupthing. Íslendska íløgufelagið hevur millum annað yvirtikið alt fíggingarvirksemi hjá Fiskavirking, sum áður hevur verið í Føroya Banka**

FÍGGJARMARKNAÐURIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað kemur dátt við hjá Føroya Banka, at Føroya Fiskavirking valdi at flyta alt virksemi sítt í bankanum til kappingarneytarnar í Kaupthing, sama dag sum Jørn Astrup Hansen fór frá sum stjóri í bankanum. Talan er ivaleyst um størsta einstaka kundan á føroyska marknaðinum, sum nú hevur vent Føroya Banka bakið.

## Kapping er harðnað

Nevndarformaðurin í Føroya Fiskavirking, Óli Hansen, váttar, at Fiskavirking hevur flutt sítt fíggjarvirksemi úr Føroya Banka í Kaupthing:

- Tað er rætt, at vit hava flutt alt virksemi til Kaupthing, men annars havi eg ikki tær stóru viðmerkingarnar til málið. Vit meta, at talan er um innanhýsis viðurskifti millum okkum og veitarar hjá okkum, ið ikki eru almenn, sigur Óli Hansen.



*Óli Hansen, nevndarformaður í Føroya Fiskavirking, váttar, at Fiskavirking hevur flutt alt fíggjarvirksemi hjá sær úr Føroya Banka til Kaupthing, men vil ikki gera fleiri viðmerkingar*

Føroya Fiskavirking hevur havt nærum alt fíggjarvirksemi hjá sær í Føroya Banka. Havandi í huga at samlaða søluvirði hjá Føroya Fiskavirking og fyrrverandi Føroya Fiskasølu í fjør var nærum 900 milliónir krónur, er talan um ein sera stóran miss hjá Føroya Banka, sum nú av álvara er farin at merkja kappingina frá íslendska íløgufelagnum.

## Ongar alarmklokkur

Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður í Føroya Banka, hevur ikki hug til at gera stórvegis viðmerkingar til, at bankin nú hevur mist Føroya Fiskavirking sum kunda.

- Vit kunnu bara staðfesta, at kappingin er harðnað nógv, og vit noyðast at stríðast fyri at verja okkara marknaðarpart, sigur Jóhan Páll Joensen.

Røddir vilja verða við, at ein av orsøkunum til, at bankin hevur mist Fiskavirking, er tann, at Jørn Astrup Hansen er farin frá sum stjóri. Spurdur um nevndin í Føroya Banka hevur ætlanir um at seta ein nýggjan stjóra afturat Janusi Petersen, sigur Jóhan Páll Joensen:

- Fyribils hava vit ongar ætlanir um at seta ein stjóra afturat, men sjálvsagt kann eg ikki siga, at tað framyvir bert verður tann eini forstjórin, sigur nevndarformaðurin í Føroya Banka.

Jóhan Páll Joensen sigur, at hóast bankin hevur mist sín størsta kunda, so er tað ikki nakað, sum fær alarmklokkurnar at ringja í bankanum:

- Kappingin er hørð, men tað er eingin panikkur í bankanum, sigur Jóhan Páll Joensen.

Tað ljóðar eisini, at fleiri aðrar stórar vinnufyritøkur hava vent bankanum bakið, men tað sigur nevndarformaðurin seg einki kenna til. Jóhan Páll Joensen sigur tó, at um so er, at bankin er við at missa fleiri stórar kundar, so er tað nakað, ið nevndin í bankanum fer at viðgerða í næstum.

# Landið heldur ikki gjaldsfreistir

**Í sambandi við at Gjaldstovan er farin at gera mánaðarlig hagtøl yvir, hvussu góður gjaldari landið er, er komið fram, at tað almenna hevur trupult við at halda gjaldsfreistir**

GJALDSFREISTIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var í fjør heyst, at Gjaldsstovan boðaði frá, at hon var farin undir eina effektivisering av gjaldsmannagongdum hjá tí almenna. Í hesum sambandi vóru krøv sett til vinnuna, um at hon gav eins gjaldstreytir til allar stovnar. Eisini var kravt, at hesar treytir vóru so mikið rímuligar, at tað fór at bera til hjá stovnum at halda hesar treytir, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu sínari.

## Stórur partur verður goldin ov seint

Nú nýggja skipanin hjá Gjaldsstovuni er farin at virka, ger Gjaldsstovan mánaðarligar uppgerðir til Fíggjarmálastýrið yvir, hvussu góður gjaldari tað almenna er. Hesi tøl avdúka, at tað almenna ikki hoyrir teir bestu gjaldarnar. Í marts mánað vóru 37 prosent av rokningunum hjá tí almenna goldnar ov seint. Vinnuhúsið sigur á heimasíðu sínari, at tað kunnu verða nógvar orsøkir til, at goldið verður ov seint. Men tað skerst ikki burtur, at trupulleikin hjá tí almenna við at halda sínar gjaldsfreistir, kostar vinnuni nógvan pening. Sambært Vinnuhúsinum hevur Fíggjarmálastýrið áður boðað frá, at tað leggur stóran dent á, at goldið verður til tíðina, og tí heldur Vinnuhúsið, at stýrið hevur nakað at fara í holt við.